gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Lærlingur til Seytjan!

Hevur tú áræði og hug til at gerast lærlingur í okkara fyritøku?

- hevur tú hug at arbeiða við móta og litum?
- ert tú røkin og fryntligur?
- ikki bangin fyri at taka tøk?
- umsøkjarin má hava FHS ella HH.

Um hettar hevur tín áhuga, send so okkum eina skrivliga umsókn innan 1. juli 2001.

**Sp/f Seytjan**
Boks 127
110 Tórshavn

# Vørukoyring

Lýst verður eftur bilførara til vørukoyring og annað nú í summarferiuni.

Møguleiki verður fyri at fáa fast arbeiði annað hvørt vikuskifti aftan á feriuna, so hetta er serstakliga vælegnað til ein skúlanæming við koyrikorti.

BREYÐMOLIN
**Ringið 444388 ella 220230**

# Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir avloysara til dagrøktarskipanina í Skála kommunu, fyri dagrøktarmammu í barnsburðarfarloyvi, at byrja 6. august.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 13.7.2001.

Nærri fæst at vita frá dagrøktarleiðaranum á

**tlf. 441770 ella 441863**

# Lærlingur til bileykalutagoymslu søkist

Til spennandi lærupláss bileykalutagoymslu okkara, verður søkt eftir ungum ágrýtnum fólki, beinanvegin ella aftaná summarfrítíðina.

Set teg í samband við Carsten ella Derek, ella send skúlaprógv og møguligt viðmæli til

P/f D. B. Bilar
J. Bronckgsgøta 15
100 Tórshavn
Tlf. 310 600

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Pleygari ella almanna- og heilsuatstøðingur

Til D2 er hetta starv leyst at søkja:

- Fast starv á starvsbrøki 0,5 sum pleygari ella heilsuatstøðingur til setan frá 1. august 2001. Tørvurin er mest í náttarvakt.

Deildin er ein akut viðgerðardeild. Á deildini starvast sjúkrasystrar, pleygarar og sosial- og heilsuatstøðingar. Deildin er ein áhugaverd deild við nógvum avbjóðingum. Vit leggja dent á eftir áhaldandi at betra um terapeutiska umhvørvið. Arbeitt verður eftir kontaktpersónaskipanini og miljøterapeutiskum meginreglum. Deildin hevur tætt samstarv við aðrar fakbólkar, so sum lækna, sálarfrøðing, ergo- og fysioterapeut. Saman eru vit eitt team, sum eru um hin einstaka sjúklingin. Vit ynskja at hava brúkaran og starvsfólkið við í støðugu menningini av deildini.

# Sjúkrasystrar

Til D1 eru hesi avloysarastørv leys at søkja

- Fast starv, blandaðar vaktir á starvsbrøki 0,7 til setan 1. august 2001
- Farloyvistarv, blandaðar vaktir á starvsbrøki 0,5 til setan 1. oktober 2001 til 31. mai 2002

Deildin er ein opin psykiatrisk móttøkudeild við 14 seingjaplássum. Á deildini arbeiða bert sjúkrasystrar. Vit arbeiða tvørfakligt á einum høgum fakligum støði við teimum nýggjastu terapihættunum. Arbeiðsumhvørvið er áhugavert, krevjandi og hevur nógvar avbjóðingar.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknarfreistin er 12. juli 2001 kl. 14.00.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Meira um størvini fæst at vita um við at venda sær til Birgit Andersen, deildarsjúkrasystir D2 tlf. 313540, lokal 422 ella Julia Hayfield D1 lokal 421, ella til Bergit Weihe, yvirsjúkrasystir, lokal 351.

# Frá S&K-felagnum

Vegna summarferiu er skrivstovan stongd frá mánadegnum 3. juli til mikudagin 1. august.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 185, P/F Einar Mikkelsen, 100 Tórshavn.

Viðtøkur broyttar: 01.06.2001
Nýtt navn: Sp/f Einar Mikkelsen
Lækkan av P/F-peningi viðtikið 21.02.2001 við kr. 248.000,00 við kurs 282,26 er nú gjøgnumførd.
Kapitalur: Kr. 252.000,00.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anna Hovgaard Dam, Millum Gilja 41, 188 Hoyvík (formaður), Høgni Bendix Mikkelsen, Gæsugøta 13, 100 Tórshavn og Ida Bendix Sørensen, Láarvegur 38, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.

Skráseting Føroya tann 25. juni 2001

Kristin Balle

GEVIÐ BLÓÐ

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3185

Navn: Sp/f Anna Katrina
Adressa: Turidargøta 7, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 20.06.2001
Viðtøkudato: 20.06.2001
Kapitalur: Kr. 293.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 293.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Tórálvur Mikkelsen, Turidargøta 7, 100 Tórshavn.
Stjórn: Tórálvur Mikkelsen, Turidargøta 7, 100 Tórshavn og Petur Meinhard Sivertsen, 476 Gjógv.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 21.12.2000 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip o.a. virki í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 25. juni 2001

Kristin Balle

**Vit søkja eftir**

# feriuavloysara

at byrja skjótast gjørligt. Hevur tú staðið í handli fyrr og dámar tær væl hetta samskifti við fólk, set teg í samband við okkum.

SIRI
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO-100 Tórshavn
Tlf. 316610 Fax 316610

Sosialurin -har tað hendir

gult25 cyan25 magenta25 svart25



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi, 35 tímar um vikuna, til Útibarnagarðin á Hvítanesi.

**Stovnslýsing**
Í barnagarðinum ganga 16 børn í aldrinum 5-7 ár. Vit halda til í sera hugnaligum umhvørvi á gamla skúlanum á Hvítanesi.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:

- er við í arbeiðinum at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børnini í gerandisdegnum
- arbeiðir sjálvstøðugt, hevur góð samarbeiðsevni, er virkin og røkin
- hevur ein hugburð merktan av opinleika, fyri at vilja menna seg í arbeiðinum saman við børnum, foreldrum og starvsfeløgum

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 15. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jóhonnu M. Hansen, leiðara, tlf. 31 77 01, lokal 10.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Býlingshúsinum Inni á Gøtu, Ovaragøta 30B, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 11. juli 2001.

SNARSKIVAN

SMS søkir eftir

# húsi í Tórshavn til leigu

til tvey vaksin og eitt barn.
Húsini mugu verða klár at flyta inn í innan 1. august 2001.

Áhugaði verða vinarliga biðin um at ringja til tel. 22 13 99.

SMS
P/F SMS POSTBOKS 1059 FO-110 TÓRSHAVN TLF. 313041 FAX 317434

# Jazzfestivalurin 2001

## Skrá

| | | | Prisur |
|---|---|---|---|
| ***Týsdagur 3. Juli*** | | | |
| Norðlýsið | 12.00-17.00 | Utferð: Conserto Grotto v/ Pia Dahl - Bo Isholm | kr. 300 |
| Gongugøtan FK | 15.00-16.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | Jassarnir | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 20.00-23.00 | Jens Nørholms Orange Jazz Family | |
| Hotel Vagar | 19.30 | Norðurlensk vísukvøld | |
| ***Mikudagur 4. Juli*** | | | |
| Vesturkirkjan | 11.30-12.15 | Gospel bólkurin PRAISE | ókeyp. |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | L.S.B. Big Band | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | ókeyp. |
| ***Norðurlandahúsið*** | | | |
| Forhøllin | 19.00-19.30 | Broby Klarinett Orkestur | kr. 150 |
| Konserthøllin | 19.30-21.00 | NHØP & Ole Kock Hansen | do |
| Klingran | 21.00-22.30 | Ulf Fleischer, Kristján Kristjánsson Enqvist/Pensar | do |
| Konserthøllin | 22.30-23.30 | Jens Nørholms Orange Jazz Family | do |
| Festival Klubbin | | Malan Thomsen Band | |
| ***Hósdagur 5. Juli*** | | | |
| Vesturkirkjan | 11.30-12.15 | Ledøje-Smørum Harmoniorkestur | ókeyp. |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Pia Dahl og Bo Isholm | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | TEIR v/ Jóannes Reinert | ókeyp. |
| F.K. Pallurin í Hoyvík | 16.30-17.30 | Jassarnir | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | ókeyp. |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | SLB Big Band - PWCIM Rock´n Soul Band - TANGZ | kr. 60 |
| Sjónleikarahúsið | 20.00-22.00 | UNG STJØRNUSKOT - Gospel PRAISE | kr. 80 |
| PLATFORM | 21.30-24.00 | Marygold - Clickhaze v/ Eivør Pállsdóttir | kr. 100 |
| Festival Klubbin | | Unn Patursson Band | |
| ***Fríggjadagur 6. Juli*** | | | |
| Listaskálin | 14.00-15.00 | Ledøje-Smørum Harmoniorkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 15.00-16.00 | Faroe Teens | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 16.00-17.00 | PWCIM Rock´n Soul Band | ókeyp. |
| F.K. Pallurin í Hoyvík | 16.30-17.30 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 17.00-18.30 | Tórshavnar Saxofon Kvartet - Jassarnir | ókeyp. |
| Hotel Hafnia | 19.30-20.30 | Grapelli Swing Jazz, Hugnatónar í Rest. Hafnia | |
| ókeyp. | | | |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | TEIR - Gunnar Guttesen - | kr. 60 |
| Sjónleikarahúsið | 20.00-22.00 | DEBAZZ - Ulf Fleischer - Kristján Kristjánsson Enqvist/Pensar | kr. 100 |
| PLATFORM | 22.00-24.00 | Hans Ulrik JAZZ-MAMBO | kr. 30 |
| do. | 24.00-04.00 | Opið sum vanligt. Tónleikur: Kim Hansen | kr. 60 |
| Festival Klubbin | 24.00-02.00 | Markku Rinta-Pollari | ókeyp. |
| ***Leygardagur 7.Juli*** | | | |
| Dómkirkjan | 11.30-12.15 | Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Gongugøtan F.K. | 12.30-13.30 | UNG STJØRNUSKOT | ókeyp. |
| Gongugøtan Vaglið | 12.00-14.00 | Tórshavnar Saxofon Kvartet - Broby Klarinett Orkestur | ókeyp. |
| Festival Klubbin | 17.00-18.30 | Pia Dahl og Bo Isholm - Grapelli Swing Jazz | ókeyp. |
| Á gamla Meiarínum | 20.00-22.00 | Unn Patursson Band - Markku Rinta-Pollari | kr. 60 |
| PLATFORM | 22.00-24.00 | Hans Ulirk JAZZ-MAMBO | kr. 30 |
| do. | 24.00-04.00 | Opið sum vanligt. Tónleikur: TANGZ | kr. 80 |
| Festival Klubbin | 24.00-02.00 | DEBAZZ | ókeyp. |
| ***Sunnudagur 8. Juli*** | | | |
| Norðlýsið | 14.00-19.00 | Útferð Conserto Grotto v/ Markku Rinta-Pollari | kr. 300 |

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!